


# Hetlendskir fiskimenn í gamla kirkjugarði

**Tað eru ikki bert føroyingar, sum eru jarðaðir í gamla kirkjugarði í Havn. Her eru eisini gamlir gravsteinar hjá hetlendskum fiskimonnum, og minna hesir um eitt serligt tíðarskeið hjá hetlendskari fiskivinnu**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Tað er kent, at hetlendingar vóru nógv fremri enn føroyingar við skipsfiskiskapi. Hetta kemur serliga til sjóndar í frásøgnini hjá Pløyen amtmanni frá síni ferð saman við nøkrum føroyingum til Hetlands í 1839. Tað var á hesi ferðini, at føroyingar lærdu at fiska við línu.

Longu tá høvdu hetlendingar ein stóran sluppflota, sum eisini fiskaði undir Føroyum.

Tá ið William Sloan kom til Føroyar í 1865 visti hann um, at 700 fiskimenn úr Hetlandi royndu undir Føroyum mest sum alt summarið.

Hetta setti so eisini sítt merki á lívið í Føroyum og eisini í Havn. Eitt áhugavert dømi um hetta er tað, sum Jens Pauli av Reyni skrivar í bóklinginum Havnin um aldamótið:

Í seinna parti av 1880-árunum og í 1890 árunum var ofta lív í gøtunum, tá ið hetlendingar vóru her. Teir plagdu at koma inn at keypa brennivín, og ofta vóru nógv skip inni í senn, upp til 50-60 sluppir. (Tað vóru um 15 mans við hvørjari, so talan hevur verið nærum 1.000 mans, sum hava fylt væl upp í gøtunum í Havn við sínum minni enn 2.000 íbúgvarum.) Teir stóðu í krambúðunum og drukku, og mangan endaði dagurin í heitum bardaga, ofta millum teir sjálvar. Men tað hendi eisini, at havnarmenn vóru uppi í dystunum, og tað var ikki sjáldan, at politistarnir máttu skilja sundur og fáa hetlendingar umborð aftur.

Gamlir menn hava ofta tikið til Ábram. Kom hann upp í slíkar bardagar, so var tað skjótt, at hann albogaði seg ígjøgnum fjøldina, og so títt og knapt hetlendingarnir sóu Ábram, so vistu teir, at annað var ikki fyri enn at sleppa sær avstað og umborð sum skjótast. Tað hendi seg eisini, at teir vórðu koyrdir í skansan.

Sagt verður eisini, at smugling av rúsdrekka, keypt í Føroyum, var ein týðandi hjávinna hjá hesum fiskimonnum. Rúsdrekka hevur eftir øllum at døma verið bíligari í Føroyum enn í Hetlandi og tí bar til at fáa ein lættan vinning.



*IN MEMORY OF*
*JAMES COUTTS*
*WALLS SHETLAND*
*LATE MASTER OF SMACK VIOLET*
*OF SCALLOWAY WHO DIED AT SEA*
*IN THE 26TH AUGUST 1896*
*AGED 44 YEARS*
*UNTIL THE DAY BREAK AND THE SHADOWS FLY AWAY*

*John Goodlad úr Hetlandi vitjar grøvina saman við Culam Neilson*



*IN MEMORY OF*
*ANDREW LAURENSON*
*BURRA ISLE, SHETLAND*
*WHO DIED ON BOARD*
*DANISH ROSE*
*OF LERWICK 11 JUNE 1874*
*AGED 30 YEARS*
*ERECTED BY OWNER AND CREW*



*Føroysk slupp og hetlendskir sildabátar inni í Lerwick*



*William Martin var upprunaliga ein hetlendsk slupp, sum fiskaði undir Føroyum. Modellið stendur í fiskivinnuskúlanum í Scalloway*

**Søgan um tveir gravsteinar**

Tað eru tvær gravir við hetlendingum heilt frá 1800 talinum í gamla kirkjugarðinum. Steinarnir er tískil meira enn 100 ára gamlir. Hóast hetta sæst innskriftin sera væl, og teir hava eisini hvør sína søgu.

Hesar søgur hava vit fingið frá John Goodlad, sum er ein tann fremsti føroyavinur í Hetlandi. Hann var eisini skrivari í hetlendska fiskimannafelagnum í mong ár.

Tann eldra av hesum gravum er sett yvir Andrew Laurenson frá Burra Isle í Hetlandi.

Andrew doyði umborð á sluppini Danish Rose úr Lerwick tann 11. juni 1874. Hann gjørdist 30 ára gamal. Steinurin var settur av manning og eigara.

John greiðir frá: Danish Rose var 70 føtur long og var 56 tons. Hon var bygd í Hull í Onglandi í 1863 og tykist at hava verið keypt í 1864 til Shetlands av John Harrison, handilsmanni í Lerwick.

Hon fiskaði inntil 1890 og var ein "typisk" hetlendsk slupp, sum fiskaði undir Føroyum, Rockall og stundum Íslandi.

Deyðin hjá Andrew Laureenson er skrásettur í Lerwick 13. June 1874 av skiparanum, tá ið teir komu aftur úr Føroyum. Deyðsorsøkin tykist at vera nakað ógreið. Tað sær tó út til, at maðurin hevur fingið ov nógv av tí váta slagnum. Men um talan hevur verið um eina vanlukku er ikki skrásett. Spurningurin er so hví teir ikki hava tikið líkið við til Hetlands, tá teir kortini fóru heim.

Eftur Andrew sat einkja og tveir synir. Annar av hesum synum gekk seinni burtur á sjónum.

Hin sonurin, sum tá var giftur, flutti seinni til Australia saman við mammuni.

Tey komu ongantíð aftur til Hetlands. Fyri tveimum árum síðan vóru teirra eftirkomarar tó í Hetlandi. Tá vitjaðu tey eisini Burra Isle, har tey hittu ættarfólk.

Skiparin kom eisini frá Burra. Han æt John Inkster og var ein av teimum best kendu hetlendsku skiparunum.

Beint mótsett øðrum skiparaum slepti hann ikki toskafiskarínum fyri ta stóru sildaveiðuna, sum kom í hæddina í 1880-unum. Hann helt áfram við sluppveiðuni, til hann doyði.

John Inkster gjørdist gamal maður og gjørdist eisini blindur. Hóast hetta rakaði hann sær hvønn dag frammanfyri speglið, hóast hann ikki kundi síggja nakað.

Hin gravsteinurin er settur yvir James Coutts úr Walls í Hetlandi. Hann var skipari á sluppini Violet úr Scalloway. James er so deyður 26. August 1896. Hann gjørdist 44 ár.

Innskriftin niðast á gravsteininum merkir nakað so: "Inntil dagur kemur og skýggini reka burtur."

John Goodlad sigur, at James Coutts er uttan iva deyður undir Íslandi. Hann er so jarðaður í Havn. Hann metir, at ætlanin hevur verið at taka líkið við til Hetlands, men teir hava helst verið forðaðir av veðri.

Violet var ein hampiliga stór slupp, sum eisini hevði damm at føra livandi fisk. Teir plagdu regluliga at lata livandi fisk til Hull og/ella Grimsby um heystið. Fyri hendan fisk fingu teir munandi hægri prís enn fyri saltfisk.

Eigari av skipinum var Nicolson & company í Scalloway.

Hesir báðir fiskimenn tykjast at vera einastu hetlendingar, sum eru jarðaðir í hesum kirkjugarðinum. Tað kann verða nevnt, at tað eru eisini fleiri gravir í gamla kirkjugarði hjá fiskimonnum úr Grimsby. Hesar eru tó seinni í tíðini. Helst hava hesir verið trolaramenn. Fleiri av hesum gravum hava eisini stein.

**Vitjaðu gravirnar hjá landsmonnum**

Herfyri var søguligi hetlendski sildabáturin Swan á vitjan í Føroyum. Tá var eitt gylt høvi at fara við John saman við Culam, sum er systirsonur konu hansara, á kirkjugarðin at vitja hesar gravir. Her er annars eisini ein onnur grøv, sum hevur samband við Hetland, og tað er tann hjá William Sloan, sum jú kom til Føroyar eftir at hava virkað í Hetlandi.

Tá ið John fortaldi sínum feløgum um hesa vitjan fingu hinir av manningini eisini áhuga, og John fór sjálvur við teimum út á kirkjugarðin. So hetta vísti seg at hava stóran áhuga. Tískil kunnu hesir gravsteinar sigast at vera enn ein ímynd av aldargamla sambandinum, sum hevur verið millum Føroyar og Hetland.

**Komandi partur**
Emil Madsen Hoff var landslækni í Føroyum. Tveir smáir synir hansara er grivnir í gamla kirkjugarði. Frásøgnin er tískil um pápan, og er hon eitt íkast til donsku embætismannasøguna í Føroyum

# Upprunaliga fiskivinnan í Hetlandi sambært Pløyen

**Frásøgnin hjá amtmanninum Pløyen frá ferðini til Hetlands í 1839 er sera hugtakandi og áhugaverd. Í samband við at vit lýsa hetlendskar fiskimannagravir í hesi røð, skal her endurgevast brot úr hesi frásøgn**


*Útróðrarstøð í Hetlandi*

Fyrst kom Pløyen til Lerwick, har tað var munandi arbeiði av fiskivinnu og sjóvinnu.

Her var saltfiskavirking av toski og longu, og Pløyen tók beinanvegin stig til, at føroyingarnir fóru at læra seg hesa framleiðsluna.

Síðani fór Pløyen at ferðast kring um í Hetlandi. Hann kom fyrst til Scalloway. Hagani fór hann til oynna Burra við báti, sum líktist teimum føroysku, men hetlendingar brúktu meira segl enn føroyingar. Tann umrøddu Andrew Laurenson var av Burra. Hann var føddur eini fimm ár eftir at Pløyen var á oynni.

Á oynni Burra sá hann stórar stakkar av klippfiski, og ein hóp av fólki - bæði konufólk og mannfólk - sum arbeiddi fisk, eins og vit nógv ár seinni gjørdu í Føroyum. Tá var einasta fiskaframleiðsla í Føroyum nakað av stokkfiski. Eisini á Burra vóru teir fúsir at læra frá sær, hvussu salt- og klippfiskur varð virkaður.

Fiskurin, sum kom upp á land á Burra, varð partvíst veiddur við opnum bátum og partvíst við sluppum. Sluppirnar vórðu serliga nýttar um veturin og várið, og ein stórur partur av veiðuni varð fluttur livandi til London í dammum.

Reiðarin keypti fiskin fyri avtalaðan prís. Skipini fiskaðu vanliga við snøri eins og føroyingar, men teir veiddu meira enn føroyingar, tí teir mistu ikki tolið, sjálvt um fiskurin ikki tók beinanvegin, og hetta loysti seg oftast.

Dømi er nevnt um eina slupp, sum fiskaði undir Føroyum í ein útsynning úr Suðuroynni. Henda sluppin fekk fyrsta túrin 9.000 og seinna túrin 5.000 toskar, og manningin var bert átta. Føroyingar fingu lítið og einki burtur úr á somu leiðum.

**Línan í Hetlandi**

Týdningarmesta veiðan var tó línuveiða við seksmannaførum, sum byrjaði mitt í mai mánaði og endaði 12. august.

Línuveiðan var so kostnaðarmikil, at teir fátæku fiskimenninir ikki høvdu ráð at fíggja reiðskap og bát, og tí vóru tað harramenninir, sum fíggjaðu. Harvið blivu fiskimenninir heftir, millum annað við at skulla selja allan fiskin til harramannin fyri ein prís, sum hann ásetti sjálvur.

Hvør lína var 42 favnar og hevði 10 húkar. Hvør bátur kundi hava 120 línur, sum vóru knýttar saman, tá ið sett var. Tilsamans vóru 1200 húkar á línuni, sum strekti 5.000 favnar.

Hetlendingar nýttu seið ella hýsu sum agn, og teir lótu agnið fjala húkin. Hetta gjørdi, at fiskurin slúkti húkin saman við agninum. Føroyingar lótu agnið hanga niður frá buganum á húkinum. Tá kundi fiskurin lættliga fara við agninum uttan at taka húkin. Hetlendsku húkarnir vóru bert ein fjórðing til støddar av húkunum hjá føroyingum, men fyri tað fingu teir ikki minni burtur úr - heldur var tað hin vegin.

Ein útróðrartúrur vardi í 24 tímar. Teir fóru út á morgni, og fóru so langt út, at teir sóu ikki land. Uttan kumpass og uttan at duga navigatión funnu teir leiðirnar, har línan verður sett á 100 favna dýpi. Línan hevði søkk og flot, og eftir nakrar tímar varð línan drigin aftur, og teir róðu aftur til lands.

Var nógv at fáa varð fiskurin sum oftast avhøvdaður, so meiri fiskur kundi rúmast í bátinum. Tað var ótrúligt, hvussu stórar mongdir av fiski, hesir fiskimenn kunnu føra til lands. Hetta kundu okkara fiskimenn eisini gjørt, um teir brúktu línu, og um húkarnir ikki vóru so stórir, at bert teir størstu toskarnir kláraðu at gapa um teir. Føroyingar høvdu eisini tann fyrimunin, at tey hægru fjøllini í Føroyum gjørdi tað lættari at staðfesta miðini.

**Útróðrarstøðir**

Fyri at stytta um teinin at rógva, høvdu hetlendingar gjørt eina skipan, sum Pløyen heldur eisini átti at verið í Føroyum. So nær sum gjørligt við fiskimiðini settu teir á stovn útróðrarstøðir, "haaf stations". Her høvdu teir skúrar við koyggjum. Teir kundu gera sær mat og hvíla, táið møguleiki var fyri tí. Tann týdningarmesta útróðrarstøðin var á Feideland norðast á Mainland, megin-oynni í Hetlandi. Her støðaðust fiskimenninir í vertíðini, sum var frá mai til 12. august. Her lá væl fyri at draga bátarnar upp á land, og hiðani var høgligt at rógva norður eftir og vestur eftir. Her varð fiskurin eisini virkaður, og her fekst øll møgulig útgerð. 60 bátar kundu halda til. Við hvørjum báti vóru seks menn. Umframt vóru øll hini, sum vóru knýtt at útróðrinum.

Tilsamans vóru upp til 3.000 fiskimenn, sum róðu út frá slíkum "haaf stations", sum tó minkaðu í týdningi, tá hetlendingar fóru at nýta sluppir heldur enn seksmannafør.

Pløyen heldur, at Oyndarfjørður og Hvannasund høvdu verið góð pláss í Føroyum at havt útróðrarstøður. Men, sum hann tekur til: "Hetta letur seg neyvan gera, so leingi einahandilin er so einaveldigur, sum hann er." Eisini krevst kunnleiki til, hvussu ein slík skipan skal setast í verk. Kanska kundu vit latið hetlendingar sjálvar sett seg niður her og harvið víst okkum, hvussu hetta skal gerast? Hilmar Kass hevur greitt frá, at hetlendingar høvdu slíkar støðir á Strondum seinnapartin í 19. øld. Tá flutti enntá tvær kvinnur við aftur til Hetlands.

**Høvdu vrakarastovn**

Tey týdningarmestu fiskasløgini vóru longa, toskur og brosma, sum vórðu virkað til saltfisk. Men hetta krevur eisini serkunnleika, og í Hetlandi høvdu teir eisini ein vrakarastovn at tryggja dygdina á framleiðsluni.

Pløyen umrøður eisini upsaveiðu í Hetlandi, sum gav nógv av sær. Serliga var nógvur upsi sunnanfyri Sumburgh Head, sunnast á Mainland. Orsøkin var tann nógvi streymurin, sum er har. Sum vit eisini kenna tað, stóð upsin ella seiðurin antin á djúpum vatni ella í vatnskorpuni, og reiðskapurin valdaðist, hvussu upsin stóð. Sum tað skilstist varð dorg brúkt, tá upsin stóð ovarlaga.

Upsin gevur ikki eins góðan klippfisk og toskur. Men tá veiðan var bílig og nógv kundi fáast, so loysti tað seg kortini.

Pløyen helt seg vita, at upsi var fiskaður í Føroyum á hendan hátt fyrr í tíðini, og hann skilti ikki, hví henda veiðan var gloymd. Sjálvt um upsin ikki kundi avreiðast, kundu hann fiskast til egna nýtslu, og føroyingar plagdu ikki at vera so kræsnir í mati! Hann ivaðist ikki í, at upsi mundi vera at fáa á Munkagrunninum, men bert royndir kundu staðfesta hetta.


*Línan verður egnd*


*Fiskaturking sum Pløyen upplivdi hana*


*Seksmannafar hjá hetlendingum*